

## Kafka á Meiarínum

Ein Kafka-inspirerað uppseting, nevnd »Investigations of a Dog« verður framsýnd hesa vikuna á Meiarínum. Frumsýning var í gjárkvøldið og hildið verður fram vikuna út. Talan er um sang og dansleik, og Tróndur B. Hansen hevur komponerað tónleikin, meðan Rannvá Káradóttir og Carly Best hava koreograferað.



# – Burturspiltur fundur um realskúlan

**Í samband við nógvu atfinningarnar av umbyggingini av gamla realskúlanum skipaði borgarstjórin í Tórshavnar Kommunu, Heðin Mortensen, í gjárkvøldi fyri kunnandi fundum fyri lærarar og foreldur hjá børnum í Kommunuskúlanum. Fyrri fundurin var fyri lærarar og tann seinni fyri foreldur.**

*Dorit Hansen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*


*Árni Vang, lærari, skýrir fundin við borgarstjóran sum ein vánaligan biograffilm*

Ein av lærarunum, sum vóru á fundi, er 31 ára gamli Árni Vang, sum hevur arbeitt sum lærari á Kommunuskúlanum, síðani hann var útlærdur síðsta summar.

Hann samanber fundin við ein vánaligan biograffilm, har tú aftaná hugsar við tær sjálvum: Har spilti eg hálvan annan tíma.

- Vit fingu onki at vita, als onki. Ongin heildarloysn varð framløgd. Borgarstjórin staðfesti bara, at realskúlin skal brúkast til fyrisitingarbygning, og at vit nú mugu hyggja frameftir.

Sambært Árna Vang komu nógvir spurningar frá lærarunum. Men tey fingu bara uttanumtos og smíl sum svar.

Kommunan framlegði eina fyribilsloysn fyri plásstrotið, har seks mobilar skúlastovur skuldu uppsetast antin í skúlagarðinum ella møguliga aftanfyri Sjónleikarahúsið. Og tá skúlin byrjar aftur, skal ein arbeiðsbólkur setast at finna eina heildarloysn fyri allan skúlan.

- Heðin Mortensen endurtók fleiri ferðir, at vit máttu hava allar møguleikar opnir. Men tá realskúlin verður avsettur til fyrisiting, so eru allir møguleikar ikki opnir, staðfestir ungi lærarin á Kommunuskúlanum.

Tvær av grundgevingunum fyri at realskúlin skal brúkast til fyrisitingarbygning eru, at stovurnar eru ov lítlar til 20 skúlabørn, og at tað fer at taka ov langa tíð at gera skúlan tryggan til skúlabrúks.

- Men tað er løgið, at stovur sum eru ov smáar til skúlastovur, vera hildnar at vera stórar nokk til fundarhøli til 60 starvsfólk, sigur Árni Vang.

Árni Vang er úr Fuglafirði, har kommunan eisini hevði ein gamlan skúla, sum ikki leyk krøvini fyri brunatrygd. Tosað var um, at skúlin mátti rívast niður og byggjast uppaftur. Hetta var fyrst í hálvfemsunum, fíggjarliga rásarúmi var lítið, so avgjørt var at seta skúlan í stand.

- Veggirnir vórðu útskiftir, brandtrappur uppsettar og so víðari. Hetta tók eina summarferiu. Men sløkkiliðsstjórin í Tórshavnar Kommunu segði í gjár, at tað kundi taka upp til 20 ár, at fáa alt upp á pláss í Realskúlanum, sigur Árni Vang undrandi.

Í PISA undankanningini kláraði Kommunuskúlin seg best. Og Árni Vang greiðir frá, at aðrastaðni, t. d. í Svøríki, hava skúlar, sum klára seg væl, verið løntir á fíggjarlógini.

- Allir skúlarnir í føroysku kanningini kláraðu seg illa, men vit vóru so frægast. Kommunuskúlin hevur eina útgreinaða námsfrøðiliga ætlan, sum bæði lærarar og foreldur eru glað fyri. Men alt hetta verður bara skúgva til viks av kommunustýrinum, sum ikki spyr og ikki lurtar eftir okkum. Alla aðra staðni verður serfrøðin tikin upp á ráð, tá skúlar verða bygdir, men ikki her, sigur hann uppgevandi.

Lærarin á Kommunuskúlanum samanber tað við, at hann fór oman í býraði og segði teimum, hvussu tey skuldu innrætta nýggja løgtingshúsið, tá tey keypa tað til býráðsumsiting.

- Sjálvandi hevði tað verið púra ørt, tí eg veit onki um býráðsumsiting. Men líka ørt er tað, at borgarstjórin ger seg til serfrøðing í skúlaskapi og skúlainnrætting.

Á fundinum segði Heðin Mortensen seg undrast yvir mótstøðuna frá lærarunum, tí tey klappaðu fyri honum, tá hann kom niðan og boðaði frá at Realskúlin varð stongdur.

- Men vit klappaðu bara, tá Heðin segði, at var tað upp til hansara, so javnaði hann skúlan við jørðina. Nú eru boðini eini heilt onnur. Men hví hann hevur broytt støðu, og hvønn hann hevur ráðført seg við, vita vit ikki, sigur Árni Vang.

- Lærarnir hava ikki læst seg fastar í, at Realskúlin ikki skal brúkast til fyrisiting. Vit eru opnir fyri øllum. Men vit ynskja at umbyggingin stegðar, at arkitektur verður tikin uppí, og ein verulig og góð heildarloysn verður funnin, staðfestir ungi lærarin.

## Skriv frá Lærarafelagnum:

**Borgarstjórin í Havn fer út um sínar heimildir og ger seg inn á leiðslurættin hjá skúlaleiðaranum í Kommunuskúlanum**

Í sambandi við málið um umbygging av gamla realskúla í Havn og ætlanir um at broyta henda til fyrisitingarbygning, hevur borgarstjórin í Havn tikið tað heilt óvanliga stig at bjóða foreldrum í 2.-6. flokki og lærarum til fundar í kommunuskúlaauluni mikukvøldið, 20. juni.

Borgarstjórin í Havn fer við hesum stigi út um sínar heimildir sum borgarstjóri. Sambært § 55, stk. 2 í fólkaskúlalógini hevur skúlaleiðarin fyrisitingarligu og námsfrøðiligu ábyrgdina av viðurskiftum skúlans. Skúlaleiðarin hevur lógarásetta skyldu og rætt at vera skúlans andlit úteftir, tá tað snýr seg um samskifti við lærarar og foreldrabólkar. Málið um umbyggingina og broyttu nýtsluni hevur stóran námsfrøðiligan týdning og er tí greitt undir samskiftisábyrgd skúlaleiðarans.

Tórshavnar kommuna hevur ábyrgdina av skúlabygningunum, men hetta kann ikki heimila samskifti við einstøk foreldur uttan um skúlaleiðaran. Býráðið skal viðgera byggiætlanir og broytingar saman við skúlastýrinum og leiðslu /lærarum, og tað er hesi, sum síðan skal hava fundir við foreldrini.

At ein borgarstjóri troðkar seg inn á heimildar- og starvsøkið hjá einum skúlaleiðara, er eitt prinsipielt, sera álvarsligt mál, sum felagið harðliga átalar og mótmælir. Føroya Lærarafelag fer at biðja Mentamálaráðið taka neyðug stig í málinum.